## UTTAN ÚR HEIMI

### Fáa hjálp úr Fraklandi

Franska løgreglan tók fyrradagin seks menn, sum eru skuldsettir fyri at hava roynt at fáa ungar franskar muslimar til Irak at berjast ímóti teimum amerikonsku herdeildunum har.

Fambært fronskum fjølmiðlum hava trygdartænasturnar arbeitt leingi við málinum, tí síðani á heysti í fjør hava myndugleikarnir lagt til merkis, at sjáldsama nógvir ungir muslimar eru farnir úr Fraklandi til Sýrialands og haðani víðari til Irak. Í juni bleiv ein maður tikin, tá hann kom aftur úr Sýrialandi til Fraklands, og tá varð sagt, at løgreglan hevði funnið ymiskt bumbutilfar í viðføri hansara.

Fronsku myndugleikarnir hava gjørt av at halda eyga við monnum, sum koma aftur úr Sýrialandi og Irak, tí hildið verður, at teir kunnu hava samband við yvirgangsfelagsskapir.

Sjálvt um Frakland var ímóti krígnum við Irak, hava tær fronsku trygdartænasturnar arbeitt tætt saman við teimum tilsvarandi tænastunum í USA og Bretlandi, skriva fronsku bløðini.

### Vil ikki eta

Tann kendi bretski ránsmaðurin Ronald Biggs, sum situr í einum fongsli í Bretlandi, er farin í hungursverkfall.

Ronald Biggs gjørdist kendur um allan heim, tá hann saman við øðrum rændi meiri enn 30 milliónir krónur úr einum bretskum toki í 1963. Biggs fekk 30 ára fongsul, men tað eydnaðist honum at flýggja til Brasil 15 mánmaðir seinni. Har gifti hann seg við einari brasilskari kvinnu, og tað gjørdi, at teir brasilsku myndugleikarnir kundu ikki senda hann aftur til Bretlands. Í 2001 gjørdi hann kortini av at fara heimaftur, og síðani hevur hann sitið í fongsli.

Biggs, sum nú er 76 ára gamal, søkti herfyri bretsku stjórnina um grið, men tá hann um vikuskiftið fekk at vita, at málið verður ikki viðgjørt enn, gjørdi hann av at fara í hungursverkfall. Sonur hansara, Michael Biggs, sigur við Sky News, at pápin er illa fyri likamliga, og at hann tí ikki tolir at svølta seg leingi.

### Fekk lívlangt fongsul

Ein serdómstólur í Irak hevur dømt Ayman Sabawi lívlanga fongsulsrevsing, eftir at hann varð funnin sekur í at hava hjálpt uppreistrarmonnum við pengum, so teir kundu keypa bumbur til bardagan ímóti amerikanarunum.

Dómurin hevur vakt ans, tí Ayman Sabawi er sonur ein hálvbróður fyrrverandi irakska forsetan Saddam Hussein, og hetta er fyrstu ferð, at iraksku myndugleikarnir hava felt dóm ímóti einum skyldmanni hjá fyrrverandi forsetanum. Hann og pápin blivu tiknir fyrr í ár, tá irakskar trygdardeildir gjørdu húsarannsóknir í býnum Tikrit, haðani Saddam er ættaður.

Stjórnin í Bagdad hevur samstundis boðað frá, at Ayman Sabawi skal aftur í rættin, tí hann er ákærdur fyri ymisk onnur brotsverk, sum hann skal hava játtað seg sekan í, skrivar Reuters. Millum annað er hann ákærdur fyri at hava lagt fleiri milliónir dollarar undir seg, tá skyldmaður hansara ráddi fyri borgum í Irak.

### Oljustuðul

Norska oljufelagið Hydro hevur latið lærda háskúlanum í Bergen níggju milliónir norskar krónur í stuðuli.

Hydro hevur leingi havt samstarv við deildina Centre for Integrated Petroleum Resarch á lærda háskúlanum í Bergen, og í síðstu viku skrivaðu partarnir undir eina nýggja samstarvsavtalu, skrivar Bergens Tidende.

Leiðslan á CIPRI sigur við blaðið, at pengarnir frá Hydro koma væl við, tí teir geva skúlanum munandi betri møguleikar at hava granskarar í starvi. Í Hydro eru tey fegin um júst hetta, tí sambært leiðsluni har hevur oljufelagið brúk fyri granskarunum og tí førleika, sum kemur burtur úr arbeiðinum á deildini.



*Soleiðis sær tað framvegis út í New Orleans, og nú er enn ein ódn í Meksikanska Flógvanum*

*Mynd: Reuters*

# Aftur vandi á ferð í New Orleans

**Fólk, sum ætlaðu sær at flyta aftur til New Orleans, noyðast at setast aftur, tí nú er aftur ein ódn á veg**

VEÐUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Um vikuskiftið gav Ray Nagin, borgarstjóri, fólki loyvi at flyta aftur til summar býarpartar í New Orleans, men nú heitir hann staðiliga á fólk um at verða verandi, har tey eru. Og tey, sum eru í býnum, skulu fara haðani alt fyri eitt.

Orsøkin er tann tropiska ódnin "Rita". Teir seinastu dagarnar hevur hon ment seg úti í Atlantshavinum, og veðurmenninir siga, at hon helst fer at versna munandi, tá hon fær megi úr tí heita sjónum í Meksikanska Flógvanum. "Rita" er ikki so ógvuslig sum "Katrina", ið herjaði New Orleans og økið har um vegir tann 29. august, men hon kann kortini gera stóran skaða, tá hon kemur inn yvir land. Amerikonsku veðurmenninir siga, at "Rita" ber fyrst við Florida, og at hon síðani fer at halda leiðina fram vestureftir. Sambært veðurmonnunum kann vindferðin koma upp í einar 60 metrar um sekundið. Tí er vandi fyri, at oljuútbúnaðurin í flógvanum kann fáa skaða, og tað hevur longu ávirkað oljuprísin, skrivar Reuters.

Longu sunnukvøldið lýsti Jeb Bush, guvernørur, statin Florida í undantaksstøðu, og umleið 40.000 fólk har suðuri í statinum fingu boð um at fara heiman. Jeb Bush ætlar ikki, at tað, sum hendi í New Orleans, skal endurtaka seg í Florida, og hann hevur tí hótt við at biðja tjóðarhirðina flyta tey burtur, sum ikki fara við góðum.

Ray Nagin, borgarstjóri í New Orleans, segði í gjár, at býurin er als ikki fyrireikaður til eina ódn afturat, skuldi "Rita" komið tann vegin. Pumpustøðirnar virka ikki nóg væl enn, og byrgingarnar kring býin eru heldur ikki liðugt umvældar.

# Simon Wiesenthal deyður

**Maðurin, sum fann nazibrotsmannin Adolf Eichmann og fleiri av feløgum hansara, doyði í gjár**

DEYÐSFALL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Simon Wiesenthal var 96 ára gamal, nú hann doyði í Wien.

Hann var borin í heim í 1908 í býnum Lviv í Ukraina, sum tá var partur av keisararíkinum Eysturríki-Ungarn. Sum ungur lærdi hann til arkitekt, men sum so mangir aðrir jødar endaði hann í týningarlegu hjá nazistunum undir seinna heimsbardaga.



*Simon Wiesenthal var deyðanum nær, tá hann bleiv funnin í týningarleguni Mathausen*

*Mynd: Reuters*

Amerikanararnir komu fram á hann í týningarleguni Mathausen í mai í 1945, og tá hann var komin fyri seg aftur, fór hann alt fyri eitt undir at jagstra tey, sum høvdu gjørt seg sek í krígsbrotsverki í nazitíðini.

Tað eydnaðist honum og medarbeiðarunum á Wiesenthal-stovninum at finna umleið 1.100 krígsbrotsmenn og at fáa teir fyri rættin. Tann best kendi mundi vera Adolf Eichmann, sum var ein av oddamonnunum aftan fyri jødatýningina hjá nazistunum. Ein annar var bøðilin Franz Stangl.

- Wiesenthal var samvitskan hjá offrunum fyri jødatýningini, segði Rabbi Marv á Wiesenthal-stovninum í gjár.